Stórtingslimur:

# EFTA er einki uttan EBS

**Næstformaðurin í norsku uttanríkisnevndini, Inge Lønning, heldur ikki, at Føroyar fáá stórvegis vinning við at gerast limur í EFTA, tá Føroyar ikki kunnu knýtast at EBS samstarvinum**

EFTA LIMASKAPUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

-Uttan at gerast partur av EBS samstarvinum, síggi eg ikki stórvegis vinning í at gerast limur í EFTA. EBS avtalan er uttan iva tað berandi í EFTA í dag. Uttan hana er felagsskapurin lítið verdur.

Norski stórtingslimurin og næst formaðurin í uttanríkisnevndini í Stórtinginum, Inge Lønning, skilir ikki, at Føroyar ynska at gerast limur í EFTA, tá føroyingar ikki kunnu gerast partur av EBS samstarvinum.

-Parturin av EFTA, sum ikki fevnir um EBS samstarvið, vigar ómetaliga lítið politiskt. Eg skal ikki leggja meg út í føroyska ynskið um limaskap, tí tað er nakað tit sjálvir mugu gera av, men eg havi ringt við at fáa eyga á stórvegis fyrimunir at vera limur av EFTA uttan EBS samstarvið, sigur Inge Lønning.

Løgmaður Jóannes Eidesgaard hevur í samband við umrøðuna av føroyskum EFTA limaskapi fleiri ferðir gjørt vart við, at hóast Føroyar gerast limur í EFTA, kunnu vit ikki gerast partur av EBS samstarvinum.

Gerast Føroyar limur í EFTA, verða Føroyar formelt nevndar "Kongeriget Danmark på vegne af Færøerne" og tá Danmark eisini er limur í ES, kemur Danmark at sita báðumegin borðið, tí EBS er nevnliga heitið á eini búskaparligari samstarvsavtalu millum EFTA londini og ES.

Í stuttum fevnir avtalan um, at kapitalur, arbeiðsmegi, vørur og tænastur hava frítt at fara millum limalondini í ES og limalondini í EFTA. Umframt tey fýra frælsini fevnir EBS samstarvið um gransking, mentan og útbúgving.

Noreg, Ísland og Liktenstein eru í dag partur av EBS samstarvinum, meðan Sveis hevur valt at halda seg uttanfyri.

### Svartskygdur

Stórtingslimurin hjá Høgra flokkinum, Inge Lønning, heldur ikki, at EFTA sum felagsskapur hevur nakra bjarta framtíð. Felagsskapurin livir í dag upp á yvirtíð, sum hann málber seg.

Inge Lønning væntar ikki, at fleiri limalond fara at leggjast afturat felagskapinum í framtíðini.

-Fyri nøkrum árum síðan var EFTA eitt alternativ til ES, men so er slettis ikki longur. Eg havi ótrúliga ringt við at fáa eyga á, at felagskapurin skal veksa í framtíðini. Møguliga fara lond sum Turkaland og onnur lond á Balkan, sum ynskja at gerast limir í ES, men sum uppnáa ES-krøvini , at leita sær til EFTA, men tað trúgvi eg lítið upp á, sigur Inge Lønning.

### Áhugi

Inge Lønning sigur seg ikki hava hoyrt stórvegis føroysku ætlanina at gerast limur í EFTA. Hann væntar kortini, at Noregi í útgangsstøðinum eru áhugaðir at fáa Føroyar upp í felagsskapin.

Hann vísir á, at kemur ein umsókn úr Føroyum um limaskap, verður tað fyri fyrstu ferð, at ein tjóð, sum ikki hevur fullveldi, søkir um limaskap.

-Tá tit ikki hava fullveldi, eru tað óivað nakrar løgfrøðiligar forðingar, sum skulu fáast av vegnum, um limaskapurin skal gerast veruleiki. Fáa tit loyst hesar forðingar og fáa stuðul úr Danmark, eri eg fullvísur í, at Noreg vil stuðla eini føroyskari umsókn, sigur Inge Lønning.



*-Tá tit ikki hava fullveldi, eru tað óivað nakrar løgfrøðiligar forðingar, sum skulu fáast av vegnum, um limaskapurin í EFTA skal gerast veruleiki. Fáa tit loyst hesar forðingar og fáa stuðul úr Danmark, eri eg fullvísur í, at Noreg vil stuðla eini føroyskari umsókn, sigur Inge Lønning*

# Føroyar eru vælkomnar í EFTA

**Fyrrverandi norski sendimaðurin hjá Noregi í EFTA, Knut Almestad, væntar ikki, at nakað limaland í EFTA fer at seta seg ímóti, at Føroyar gerast limur í felagsskapinum. Hann heldur, at føroyskur limaskapur er eitt gylt høvi hjá Noregi, Íslandi og Føroyum at styrkja fiskivinnusamstarvið**

EFTA LIMASKAPUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

-Eg trúgvi ikki nøkur tjóð í EFTA fer at seta føtur í spenni, um Føroyar velja at senda eina almenna umsókn til EFTA um limaskap. Fyriuttan møguligar trupulleikar av ríkisrættarligu støðuna millum Føroyar og Danmark, síggi eg ikki, at Føroyar fara at hava nakrar trupulleikar at gerast limur.

Løgfrøðingurin og fyrrverandi norski sendimaðurin, Knut Almestad, heldur ikki, at føroyingar skulu bera ótta fyri, at limalondini í EFTA fara at ganga móti eini møguligari føroyskari umsókn um EFTA-limaskap.

### Styrkt fiskivinnusamstarv

Knut Almestad hevur drúgvar royndir sum sendimaður fyri norska uttanríkisráðið. Hann hevur í fleiri ár arbeitt fyri EFTA, og hann hevur eisini havt tilknýtið til norsku ES-sendistovuna í Brússel.

Fyrrverandi norski sendimaðurin sær gyltar møguleikar fyri einum sterkum íslendskum, norskum og føroyskum fiskivinnusamstarvi, um Føroyar gerast limur í EFTA.

-Tað er einki dulsmál, at gerast Føroyar limur av EFTA, fer EFTA at standa munandi sterkari á fiskivinnuøkinum. Tú mást minnast, at Noreg, Ísland og Føroyar umsita hvør sær nógv størsta partin av fiskivinnuni í Norðuratlantshavi. Velja tey trý londini at ganga saman í EFTA, verður støðan munandi sterkari mótvegis ES, sigur hann.

Spurdur, um hann væntar, at Sveis og Liktenstein fara at seta spurning við føroyskan limaskap í EFTA, tá hugsað verður um, at ein fiskivinnutjóð kemur afturat Noregi og Íslandi í felagsskapinum, er stutt og greiða svarið hjá fyrrverandi norska sendimanninum:

-Nei tað rokni slettis ikki við. Eg vænti, at báðar tjóðirnar taka gleðiliga undir við føroyskum limaskapi.

### Eingin deyður hestur

Síðan løgmaður gjørdi greitt undir røðuni á ólavsøku, at Føroyar í næstum fara at søkja um limaskap í EFTA, hava røddir verið frammi um, at EFTA sum felagsskapurin ikki hevur stórvegis framtíð.

Bæði búskaparfrøðingurin, Óli Samróð, og formaðurin í uttanlandsnevndini í løgtinginum, Johan Dahl, hava verið frammi í fjølmiðlunum, og gjørt vart við, at teir ikki meta, at limaskapur í EFTA er nøkur loysn fyri føroyska samfelagið, tí eingin framtíð liggur í felagsskapinum. Teirra sjónarmið bygdi serliga á, at tað er bert spurningur um tíð, áðrenn Noreg og Ísland velja at fara úr EFTA, og gerast limir í ES.

Knut Almestad er ikki so svartskygdur. Hann ásannar, at EFTA í altjóða høpi er ein lítil felagsskapur, men hann sær hinvegin ikki fyri sær, felagsskapurin fer at detta niðurfyri í næstum.

-Hóast kjakið um norskan og íslendskan limaskap í ES er javnan uppi og vendir, so síggi eg hvørki Noreg ella Ísland gerast limir í ES í nærmastu framtíð. Megna EFTA londini at halda fast í EBS samstarvinum (búskaparligt samstarv millum EFTA og ES, blðm), so trúgvi eg, at EFTA heldur fram í sama mun, sum seinastu árini, sigur Knud Almestad.